## DAGSINS MEINING

# Sølan av Sosialinum og journalistiskt handverk

Í morgin verður tað ein vika síðani, at tað varð alment, at Sosialurin varð seldur. Í tíðindaskrivi varð boðað frá, at leiðslan, starvsfólkini og Føroya Tele høvdu keypt. Seinnapartin fríggjadagin var móttøka, og síðani hava vit hildið fram við fullari orku við at fyrireika okkum til framtíðina.

Í løgtinginum varð mikudagin spurnartekin sett við leiklutin hjá Føroya Tele, nú teir hava keypt triðingin av Sosialinum. Partafelagið Føroya Tele, sum virkar við ábyrgd yvirfyri partafelagslógini, er væl og virðiliga ført fyri at verja seg sjálvt móti skuldsetingum og illgitingum.

Á Sosialinum vekir handfaringin av søluni í øðrum miðlum hesar seinastu dagarnar stóra undran, og vit standa spyrjandi. Gamaní eru vit kappingarneytar við bløð og loftbornu miðlarnar. Men tað eigur ikki at vera orsøk til, at journalistiska handverkið og øll prinsippir í góðum fjølmiðlasiði verða blakað fyri borð í ógrundaðari roynd at seta Sosialin og eigaraskiftið í óvanliga ringt ljós.

Orðaskifti var í Løgtinginum mikudagin. Tað vóru tey, sum sóu trøll á alljósum degi og sammettu handilin við Sosialinum við støðuna á italska miðlamarknaðinum. Hetta er álvarslig skuldseting, men politikararnir mugu hava loyvi at hava sínar meiningar. Í tinginum varð Sosial handilin lýstur og viðgjørdur frá fleiri síðum. Orðaskiftið var hvast. Umframt omanfyri nevndu súru útsøgnir og illgitingarnar vóru tað tey, sum ikki dugdu at síggja trøllini og heldur vardu stigið at selja blaðið og sóu nýggjar møguleikar og avbjóðingar fyri føroyska fólkaræðið í hesum.

Hetta síðsta er í okkara verð so sjálvsagt. Politiski viljin er, at útvarpið og sjónvarpið skulu leggjast saman í Kringvarpið. Í júst hesum veruleikanum eigur tað at vera týdningarmikið og alneyðugt, at aðrir miðlar verða styrktir soleiðis, at møguleikarnir fyri kapping á miðlamarknaðinum verða betri. At aðrir rópa upp um italskar tilstandir kann ikki annað enn takast sum staðfesting av, at ætlanin framvegis er at halda fram við illgitingunum og jagstranini av Sosialinum, sum somu persónar hava verið partur av undan eigaraskiftinum. Tey um tað.

Public service útvarpið lýsti orðaskiftið um fyrispurningin í tíðindunum mikukvøldið. Hátturin, sum tíðindini vóru viðgjørd, var so langt frá góðum fjølmiðlasiði, sum tað ber til at hugsa sær. Teir, sum bóru hørðu ákærurnar fram, og teir, sum vóru ivasamir, fingu mikrofonina fyri seg sjálvar. Hin partin hoyrdist einki til, og tíðindakvinnan ómakaði sær ikki at skoyta uppí, at tað vóru ymiskar meiningar um henda spurningin.

Vit undrast og spyrja, hvar góða handalagið og handverkið, sum tey í útvarpinum eiga, bleiv av. Hvat var motivið aftanfyri innslagið, og hvønn er tað, útvarpið rennur ørindi fyri?

Mikukvøldið hevði Dimma grein á forsíðuni um hetta sama málið. Henda forsíðusøgan eigur at vera gott dømi um hjá teimum, sum læra til tíðindafólk, hvussu grein ikki skal fyrireikast og skrivast. Eingin kelda varð upplýst, og greinin var full í faktuellum skeivleikum. Seljarin var ikki spurdur, og keyparin var ikki spurdur. Góða handverkið og vanligi fjølmiðlasiðurin vóru løgd til viks. Vit undrast og spyrja hvat motivið var aftanfyri greinina, og hvønn tað er, Dimma rennur ørindi fyri?

Ei undur í um lesarar og lýsarar undrast og standa spyrjandi, tá ið teir síggja og hoyra allar hesar røvarasøgurnar frá teimum, sum annars plaga at duga sjálvsagda journalistiska handverkið. Sosialurin hevur ongantíð verið lýtaleysur, og tað verður hann neyvan. Men tað verður hildið fram við at menna blaðið, og eftir søluna eiga fyritreytirnar fyri støðugt betraðum blaði og øðrum miðlatiltøkum at vera uppafturbetur. Meðan stavsfelagar okkara gera journalistisk sjálvmál, undrast vit og arbeiða víðari. Tað er ikki sørt, at orðatakið "Man merkt die Absicht und wird verstimmt", rennur fram í hugan. So vánaligt frágingið handverk eigur ikki at verða latið av hondum av so dugnaligum journalistum!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Til Jan Haldansen



**MARJUN OLSEN**
næstform. í Suðuroyar Sambandsfelag

Í Sosialinum 28. mars 2006 sigur tú teg venda Sambandsflokkinum bakið.

Tað er altíð keðiligt hjá einum flokki, tá fólk melda seg úr flokkinum.

Í tínum føri verður saknurin nokk ikki so stórur, fá hava sæð nakað, flokkinum at frama, frá tínari hond.

Tú var fyrstu ferð á fundi hjá Sambandsflokkinum hóskvøldið 16. mars – bleiv valdur í nevndina fyri Suðuroyar Sambandsfelag – Meldaði teg inn í Sambandsflokkin 17. mars og bleiv valdur sum formaður í Suðuroyar Sambandsfelag 18. mars. Longu 25. mars sigur tú teg melda teg úr aftur bæði nevnd og flokki, einahelst, tí ikki gekst sum tú vildi,

Tann framferð, tú hevur víst síðani 18. mars, hevur onki við sambandspolitikk at gera.

Suðuroyar Sambandsfelag hevur virkað síðani áðrenn tú sást dagsins ljós og verður ikki avtikið, bara tí tú heldur tað.

**Betur er bøtandi hond enn spillandi tunga.**

Við sambandskvøðu
Tvøroyri 30. mars 2006

# Er okkara fjølmiðlaverð serliga opin og objektiv?

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**

Nei, kann onkur verða skjótur at svara, men so einfalt er tað neyvan.

Hvat gera vit borgarar, tá vit eru vitni til, at ein av okkara fremstu fjølmiðlum, Sosialurin, fer á marknaðin at vera ein fyritøka, sum ein og hvør er vælkomin at keypa – ella er tað so?

Eg eri bangin fyri, at vit, enn einaferð, eru vitni til enn eina samantvinning er millum ávísar áhugaðar politiskar bólkar, sum neyvan kenna sítt mark í strembanini eftir sjálvattrektivum og maktsinnaðum vinningi.

Vit eru nøkur sum royna at berjast fyri, at BORGARIN fær røttu prísirnar og tænastuna á fjarskiftisøkinum, men hvussu kunnu vit verða vís í, at TIT borgarar fáa hesa objektivu og tænastufremjandi tænastuna í framtíðini – tá vit eru vitni til tað vit síggja í løtuni?

Hoyrdi stjóran á Sosialinum siga, at kom okkurt kritiskt undan kavi, so er Sosialurin tann fyrsti at vísa á skeivleikan mótvegis Føroya Tele – LAT OKKUM SÍGGJA HETTA Í VERKI – TAKK!

Eg eri bangin fyri gongdini, og tí vil eg mæla til, at vit eru meira kritisk, tá tað snýr seg um einskiljingartilgongdina...




**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.